# Vit skulu rópa harðari



**Heili 700 fólk vóru savnað í Fugloy á útoyggjastevnu leygardagin**

ÚOYGGJASTEVNA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Vit skulu rópa harðari!

Tað var niðurstøðan á aðalfundinum í Útoyggjafelagnum leygardagin.

Aðalfundurin var í Fugloy, har eisini Útoyggjastevna var og tað sigast at hava verið eitt sera væleydnað tiltak, tí har vóru ikki færri enn 700 fólk savnað í Fugloy.

Fólk vóru komin í oynna úr øllum landinum og við alskyns bátum og førum, bæði almennum og privatum.

Og har var gott lag í Fugloy, bæði á Kirkju og í Hattarvík. Um dagin vóru tiltøk í Hattarvík og um kvøldið var farið til Kirkju, har føroyskur og enskur dansur var tað mesta av náttini.



*Hetta er nevndin og umboðsráðið í Útoyggjafelagnum Frá vinstru standa: Magnus Eliasen, Mikladalur, Poulina Eliasen, Syðradalur, Sanna Silvurstein, Hestur, Fríða Isaksen, Húsar, formaður í umboðsráðnum, Óla Jákup úr Dímun, formaður í nevndini, Harry Jensen, Skúvoy, Eyðun Eliasen, Trøllanes, Esbern í Eyðanstovu, Mykines, næstformaður í nevndini, Olga Biskopstø, skrivari og samskipari og Jógvan Jón Petersen, Stóra Dímun. Andras í Frammistovu umboð fyri Fugloy og Katrina Johannesen umboð fyri Mykines, eru ikki við á myndini.*

## Rópa harðari

- Á aðalfundinum samdust vit um, at hereftir skal felagið gera meiri vart við seg í politiska kjakinum, sigur Olga Biskupstø, sum er skrivari hjá felagnum.

Hon sigur sostatt, at semja er um, at felagið eigur at vera meiri virki í politiska kjakinum og eigur at gera vart við seg, tá ið politikarar viðgera útoyggjamál.

Sum eitt dømi nevnir hon, at Farmaleiðir vórðu einskildar og tað fekk stóra ávirkan á viðurskiftini á útoyggj.

- Vit ætla eisini at bera so í bandi, at fleiri einskiljingar